# Ferðin við Tusk

Í nevndu grein í Dagblaðnum verður hildið fram:

"Tann ferð Óli Svendsen hevur gjørt, og sum fólk minnast best til, er ferðin við Tusk í 1925, táið hann og djóralæknin Carl Johan Bech fóru avstað á 65 ára føðingardegi Svendsens. Tað var sunnudagin 21. juni 1925. Ein hópur av bátum fylgdu teimum á veg, meðan orkestrið Ólivant spældi ymisk føroysk løg, tá teir fóru suður gjøgnum fjørðin. Tveir dagar seinni komu teir til Midyell í Hetlandi. 3. juli komu teir til Stavanger. Og har frá runt alt Suður Noreg til Oslo, síðan til Skagen og Keypmannahavnar.

Eitt er vist, at uttan Óla Svendsens dugnaskap sum sjómaður hevði Tusk aldri komið fram."

## Høvdu primus umborð

Beint áðrenn fráferðina fekk Dimmalætting eina samrøðu við teir báðar. Teir høvdu báðir bestu vónir um, at hetta fór at bera til. Men "for alle Tilfældes Skyld er Baaden forsynet med Drivanker og Oljeposer til benyttelse i daarlig Vejr, og man har truffet forskellige andre Forsigtighedsforanstaltninger.

Tusk er 27 fod lang, og den er saa svært lastet, at den flød tungt paa Søen. Der medbragtes Proviant for 14 Dage bestaaende af Skærpekød og andre Fødemidler, der let lader sig gemme.

Et Primus Kogeapparat findes ombord, men dette vil kun kunne bruges i helt godt Vejr.

Roknað varð við at kunna koma til Bergen eftir 3½ samdøgur. Annars mettu sakkøn, at henda ferðin var nakað av einum vágaverki. Alt kom ann uppá veðrið, men tað kundu eisini koma trupulleikar, sum ikki kundu forútsíggjast. Tað er nú stórur munur á at sigla við einum opnum báti og einun deksbáti. Hetta krevur umhugsan og sjómanskap.

Men endamálið við ferðini var annars at prógva dygdina av føroyska bátinum.

Um luttakararnar varð sagt: Skibsfører Ole Svendsen er en af vores allerdristigste Sømænd, og han er ogsaa af Udseende en typisk færøsk Sømandsskikkelse. Ole Svendsen var i begyndelsen af 90-erne Fører af et færøsk Fiskeskib paa en Ekspeditionsrejse til Jan Mayen, og han har udført mangen udmærket Sømandsbedrift. Endskønt han snart har naaet Støvets Aar, er han endu lige saa rask og uforfærdet som i sine yngre Dage.

Dyrlæge Bech er en ung Mand, men han har foretaget flere dristige Ture med Tusk under daarlige Vejrforhold og har adskillige Gange været stillet overfor kritiske situationer.

## Tá Tusk kom til Oslo

Tað var nokk so nógv skrivað um ferðina. Teir báðir sendu bløðunum gjølligar frásagnir um, hvussu túrurin gekk. Tað er tó avmarkað, hvussu nógv ið rúmast í hesi grein. Men tá ið teir komu til Oslo kom henda frágreiðing frá teimum:

Síðani vit fóru frá Føroyum hava vit havt regn eina nátt, ta náttina, vit sigldu framvið Jæderen og Lindesnæs, og tá var eisini heldur vánaligt veður.

Týsdagin kl. 3 fóru vit frá Horten og høvdu tveir ferðamenn – journalistar - við okkum. Veðrið var av tí allarbesta við einum lítlum loti inn eftir, so vit høvdu góðan seglbyr. Vit sigldu framvið fleiri skipum. Øll heilsaðu tey við flagginum, og mannskap og ferðafólk róptu vælkomnir og veitraðu til okkum. Øll kenna nú Tusk frá bíløtum og umtalu í bløðunum. So hvørt vit komu longur inn, vórðu skipini fleiri og fleiri, og frá skipunum og teim vøkru húsunum niðri við strondina vórðu vit heilsaðir við norska flagginum, so maðurin, ið sat afturi í rong hevði nóg nógv at gera við at heilsa aftur við tí danska flagginum. Í fremra stavni veitraði Tjaldursmerkið, og í mastratoppinum hitt norska flaggið við Bergen Motorbaadsforenings's standara undir.

Okkurt um hálvfjórðing frá innsiglingini til Dronningen á Bygdøy, har Kgl. Norsk Sejlforening heldur til, vórðu vit fylgdir av 15 størri og smærri kappsiglarum, motorracers og øðrum førum, og tá vit komu til lands var talið 35-40 skínandi hvítir bátar við teirra óføru stóru seglum.

Við øllum hesum ljósa og vakra aftanfyri kom Tusk spakuliga siglandi inn eftir. Tað vóru fólk í túsundatali, sum tóku ímóti.

Í dag vóru vit til morgunmat hjá tí danska ráðharranum, sum vísti okkum óføra góðan blíðskap.

## Tá Tusk kom til Keypmannahavnar

Dimmalætting endurgevur frásøgn frá Keypmannahavn dagfest 17. juli 1925, har tað millum annað verður sagt:

Paa Femugersdagen for sin Afsejling fra København er Færøbaaden Tusk da endelig kommet til København, der er den lange Rejses Endemaal. Haardt har det til Tider knebet, men med sej Energi har de to Mænd ført deres Vovestykke igennem.

Den lille Vikingebaad kunde ikke været kommet paa en heldigere Dag. Øresund var spækket med Lystsejlere, og et skønnere Indtryk af den danske Natur ved Sund og Bælt kunde ikke gives vore Gæster.

Víðari verður sagt, at tað vóru túsundir av fólki savnað at heiðra hesar víkingar. Sjálvt kongaskipið Dannebrog við kongshjúnunum umborð var millum allar bátarnar í Oyrasundi hendan dagin.

"Paa lang Afstand kunde man lige skimte Kongen, svingende den hvide Kasket som en hjertelig Velkomst til den lille Baad, der saa tappert har gennemført sin Rejse."

À Langelinie vóru fólk ovurfegin. Har lógu nøkur amerikonsk herskip, har manningin ikki visti, hvat hesin vasin var um.

Men ein av fyriskiparunum Valdemar Nielsen, setur róparin fyri munnin og rópar av allari megi: "That is the Faroese Boat Tusk coming from Faroe Islands."

Hermenninir sóu eina løtu eitt sindur ráðvillir út, men so gekk hetta upp fyri teimum, og teir sveiggjaðu sínar húgvur sum ein heilsan frá teimum.

Síðan hevði fólkatingsmaðurin Halfdan Henriksen eina heilsan. Sagt verður at enda í Dimmalætting:

Skipper Svendsen gør Forsøg paa at fortøje agten for Tjalfe (ein brig) for at gaa i land her, men det er ganske umuligt at komme til for Mennesker. Han maa gaa over paa Siden af Tjalfe. En Rebstige kastes ud, og ad den klatrer Skipper Svendsen og Dyrlæge Bech og hans Kone, (sum er komin umborð í Danmark) op paa Klubskibet, hvor de modtages med den største Hjertelighed. Blandt de første, som iler til for at trykke Vikingernes Hænder er Finansborgmester Hedebøl, som har givet Møde paa Kommunens Vegne.

Agterude paa Tjalfe er arrangeret et improviseret Kaffebord, men Færingerne faar ikke lov til at sidde saa forholdsvis ubemærket.



*Víkingarnir á ferð*

## "Ud paa Landgangen!"

lyder det fra folk og da de to Mænd viser sig, bryder Jubelen løs. Hurraraabene bliver ved, som skulde de aldrig holde op. En stor Skare herboende Færinger er mødt frem og istemmer Nationalsangen "Eg oyggjar veit," medens alle blotter Hovederne. Det var et stemningsfuldt og gribende Øjeblik.

Men nu haster det. Der er Æresmiddag Kl. 7 paa Tjalfe for de to Vikinger.

## Tusk kemur heim aftur

Dimmalætting skrivar um heimkomuna til Føroyar:

Tusk og teir báðir víkingarnir Óli Svendsen og Carl Johan Bech komu heim aftur við Tjaldur seinasta mánadag. Ein stór mannamúgva var komin saman at taka ímóti teimum. Tað var ein føgur sjón at síggja Tusk sigla inn eftir Eystaruvág, prýddur við øllum teimum heiðursmerkjum, hann hevur vunnið sær á síni ferð. Hornblástrifelagið Olivant spældi føroysk songlóg og hópur av fólki tyrptist saman, har Tusk legði at fyri at bjóða honum vælkomnan til Føroya.

Tá flutti formaður løgtingsins Oliver Effersøe fram hesa røðu:

Mótaðir menn, treystir menn og góðu Føroyingar. Eg bjóði tykkum vælkomnar aftur frá roysnisferð, æruferð og stórverksferð.

Eitt rætt stórverk var tað at fara tveireinir yvir Norðurhavið við opnum báti. Hesa ferð hava tit stóra æru av, og tykkara nøvn vilja blíva goymd gjøgnum komandi ættarlið her á landi. Men ferðin hevur eisini verið til æru fyri føroyingar og Føroyar. Tí biði eg øll, sum eru stødd her, um at rópa eitt leingi livi fyri Óla Svendsen og Carl Johan Bech."

Hurrárópini ljóðaðu nú hart og treystliga yvir hin stilla vág, so tey hoyrdust langar leiðir. Carl Johan Bech takkaði fyri ta góðu móttøku. Bæði hann og Svendsen vóru fegnir yvir at vera komnir heim aftur til føðilandið í øllum góðum. Hann endaði við at biðja tey, ið her vóru komin saman um at rópa eitt "Leingi livi Føroyar."

Hetta var ein vøkur og hugtakandi hátíðarstund, sum vit leingi vilja minnast.

Óla Svend gjørdist eisini kendur í 1904 og 1935 fyri sínar royndir at leita eftir Norsku Løvu, men tað er ein heilt onnur søga.



*Hetta er helst, tá komið verður til Keypmannahavn. Kona Carl Johan, Birthe, er komin umborð*

Sosialurin

**Rætting**

Í seinasta parti varð sagt, at Jógvan Simonsen var tann fyrsti føroyingur, sum lat skip byggja uttanlands. Skal tað vera heilt rætt var hann triðifyrstur. Men hetta er kortini fyrsta skip bygt fyri pening úr Føroyum

**Komandi partur**

Komandi partur verður ein frásøgn hjá Petur Alberg um vitjan av norskum sangkóri i Havn í 1924